# Øskufía

Einaferð var ein ríkur maður. Kona hansara var sjúk, og tá ið hon kendi á sær, at deyðin nærkaðist, rópti hon onkadóttrina til sín og segði: »Vér góð og skikkilig, so verður Gud við tær. Eg fari at eygleiða teg úr himlinum og ongantíð gloyma teg.« So læt hon eyguni aftur og doyði.

Dóttirin gjørdi, sum móðirin ráddi henni til, og var hvønn dag á grøvini og græt. Veturin kom, og kavin fjaldi grøvina. Men um várið, tá ið sólin bræddi kavan, giftist maðurin upp aftur.

Nýgifta konan átti frammanundan tvær døtur. Tær vóru vakrar á at líta, men grimmar í huga, og stjúkdóttirin fekk av at vita.

»Handa tápugásin í okkara stovu?« søgdu systrarnar. »Nei, tú mást sjálv vinna tær føðina, út í køkin við tær!«

Tær tóku vøkru klæði hennara, og ístaðin fekk hon tuflur og elligamlan, gráan kjóla. »Vøkur er hon, kongsdóttirin hin væna,« søgdu tær háðandi og róku hana út.

Frá árla á morgni til síðla á kvøldi mátti hon stríðast, bera vatn, kynda upp, matgera og vaska. Har afturat var hon plágað og pínd av systrunum. Tær argaðu hana og stoyttu í øskuna ertrar og flatbønir, sum hon so skuldi henta upp.

Ein dagin skuldi faðirin til keypstaðin og spurdi báðar stjúkdøturnar, hvat hann skuldi keypa teimum.

»Vøkur klæði,« segði onnur. »Perlur og gimsteinar,« segði hin.

»Og Øskufía, hvat ynskir tú tær?« spurdi hann.

»Pápi, eg ynski mær fyrstu greinina, ið tekur hattin av høvdinum á tær, tá ið tú ríður heim aftur,« segði hon.

Faðirin keypti vøkur klæði, perlur og gimsteinar, og tá ið hann á heimvegnum reið gjøgnum tætt nøtakjarr, tók ein grein hattin av høvdinum á honum. Hann breyt hana av og tók hana við. Heimkomin gav hann døtrunum tað, tær ynsktu sær, og Øskufíu greinina.

Hon takkaði, fór út á grøvina hjá móðurini og plantaði greinina. Hon stórgræt. Tárini vættu moldina, og greinin vaks skjótt til eitt vakurt træ. Tríggjar ferðir dagliga var Øskufía á grøvini og græt og bað, og hvørja ferð kom hvítur fuglur og settist á træið. Fuglurin tveitti henni tað, hon ynskti sær.

So var tað, at kongur gjørdi stórt gestaboð. Allar vakrar gentur í landinum vóru bodnar í veitslu, og kongssonurin skuldi velja sær konu teirra millum. Veitslan skuldi haldast í tríggjar dagar. Báðar stjúkdøturnar vóru bodnar við, og frøin var stór. Tær róptu á Øskufíu og søgdu:

»Kemb okkum og skógvarnar busta. Vit eru bodnar á kongsins borg.«

Øskufía aktaði. Men hon græt, tí hon vildi so fegin sleppa við. Hon bað stjúkmóðurina um at sleppa. »Tú við?« segði hon. »Nei, Øskufía. Tú ert tann bera øska. Skitin og tvitin ert tú eisini og eigur hvørki skógvar ella kjóla. Nei, ikki talingur um.«

Øskufía bønaði og bað, og so segði stjúkmóðirin: »Nú tveiti eg hesa skálina við flatbønum í øskuna. Kanst tú henta tær upp innan tveir tímar, sleppur tú við.« Øskufía fór gjøgnum bakdyrnar út í urtagarðin og rópti:

»Tomu dúgvur, turtildúgvur og allir smáir fuglar. Komið mær til hjálpar og

savnið góðu í dósina
og vánaligu í kjósina!«

Fyrstar vóru tvær hvítar dúgvur, síðani turtildúgvurnar, og stutt eftir tyrptust allir himinsins fuglar inn og settust í øskuna. Dúgvurnar nikkaðu og fóru til verka — pikk, pikk, pikk — og hinir fuglarnir hermdu — pikk, pikk, pikk. Tíma seinni høvdu teir savnað góðu bønirnar í skálina og flugu burtur.

Øskufía fór brosandi til stjúkmóðurina við skálini, nú slapp hon við! Men stjúkmóðirin segði: »Nei, Øskufía, tú eigur einki at fara í, og ikki dugir tú at dansa. Tú verður til láturs.«

Øskufía brast útúr at gráta, og stjúkmóðirin segði:

»Kanst tú innan ein klokkutíma savna tvær skálir av flatbønum úr øskuni, so skalt tú sleppa.« Men innantanna hugsaði hon: »Tað er vónleyst.«

Hon tveitti tvær skálir av bønum í øskuna, og Øskufía fór gjøgnum bakdyrnar út í urtagarðin og rópti: »Tomu dúgvur, turtildúgvur og allir smáir fuglar. Komið mær til hjálpar og

savnið góðu í dósina
og vánaligu í kjósina!«

Fyrstar vóru tvær hvítar dúgvur, síðani turtildúgvurnar, og skjótt tyrptust allir himinsins fuglar inn og settust í øskuna. Dúgvurnar nikkaðu og fóru til verka — pikk, pikk, pikk — og fuglarnir hermdu — pikk, pikk, pikk. Hálvan tíma seinni vóru góðu bønirnar í skálini, og fuglarnir flugu avstað.



Aftur fór Øskufía brosandi við flatbønunum til stjúkmóðurina og helt, at nú slapp hon við. Men stjúkmóðirin segði:

»Tað ber ikki til. Tú fert ikki. Eingi klæði eigur tú, og ikki dugir tú at dansa. Tú gert okkum fyri skommum.«

Hon vendi henni bakið og fór við døtrunum í veitslu.



Tá ið øll vóru farin, fór Øskufía út á grøvina hjá móðurini og tosaði við nøtatræið:

»Nøtatræ, tínar greinar skaka,
og gull og silvur til mín blaka.«

Og fuglurin tveitti henni kjóla úr gulli og silvuri, umframt silkiskógvar, baldýraðir við silvuri. Kvikliga læt hon seg í og fór í veitslu. Kjólin klæddi henni væl, og hvørki systrarnar ella stjúkmóðirin kendu hana aftur. Tær hildu hana vera fremmanda kongsdóttur og droymdu ikki um, at tað var Øskufía. Hon sat jú heima og leitaði eftir flatbønum í øskuni.

Kongssonurin bukkaði fyri henni, tók í hond hennara og dansaði við henni. Og hann vildi ikki dansa við nakrari aðrari. Hann slepti henni ikki, og tá ið aðrir buðu henni upp, segði hann: »Nei, hon er mín.«

Hon dansaði, til tað fór at myrkja, so ætlaði hon sær heim, og kongssonurin segði: »Eg fylgi tær á veg,« tí hann vildi vita, hvar hon búði.

Men hon smeyg sær frá honum og fór inn í dúgvubúrið.

Kongssonurin bíðaði, til faðir hennara kom, og so segði hann, at fremmanda gentan krógvaði seg í dúgvubúrinum.

Faðirin hugsaði: »Man tað vera Øskufía?« Og hann fekk sær øksu og sleggju og breyt búrið niður, men har var eingin.

Øskufía lá við grúgvuna í skitnu klæðum sínum, og login í oljulampuni, sum hekk uppiyvir, fánaði burtur. Hon var í skundi lopin út aftanvert við búrið, farin til fuglin við klæðunum og hevði síðani latið seg í skitna kjólan og lagt seg at sova.



Dagin eftir helt veitslan fram, og tá ið foreldrini vóru farin á kongsborgina saman við stjúksystrunum, fór Øskufía til nøtatræið og segði:

»Nøtatræ, tínar greinar skaka,
og gull og silvur til mín blaka.«

Fuglarnir tveittu henni ein enn vakrari kjóla, og tá ið Øskufía trein inn í veitsluhøllina, gjørdust tey ovfarin, so vøkur var hon. Men kongssonurin, sum hevði longst eftir henni, tók beinan vegin í hond hennara og dansaði alla tíðina við henni. Tá ið aðrir buðu henni upp, segði hann: »Nei, hon er mín.«

Um kvøldið, tá ið hon fór heim, fór kongssonurin aftan á henni, men hon smeyg sær frá honum og rann inn í urtagarðin aftan fyri húsini. Har stóð stórt træ við nógvum, búnum perum, og sum álvindur kreyp hon upp í træið og krógvaði seg í krúnuni. Kongssonurin misti hana burtur og bíðaði, til faðirin kom heim. »Fremmanda gentan rýmdi frá mær, eg haldi hon krógvar seg í perutrænum,« segði hann.

Faðirin hugsaði: »Man tað vera Øskufía?« Hann kom aftur við øks og feldi træið, men har var hon ikki. Hon var kropin niður úr trænum, hevði givið fuglinum klæðini og latið seg í gamla kjólan.

Triðja dagin fóru foreldrini og systrarnar aftur í veitslu. Tá ið tey vóru farin, fór Øskufía út á grøvina og segði við træið:

»Nøtatræ, tínar greinar skaka,
og gull og silvur til mín blaka.«

Tá kastaði fuglurin henni gullskógvar og kjóla, sum bar av øllum. Tá ið hon trein inn í veitsluhøllina, mistu tey ondina, so huggripin vóru tey. Kongssonurin dansaði bara við henni, og tá ið aðrir buðu henni upp, segði hann: »Nei, hon er mín.«

Seint á kvøldi fór Øskufía heim, og kongssonurin aftaná. Men heldur ikki hesa ferð, var hann nóg kvikur.

Miseydnaðu royndir hansara høvdu tó givið honum tað hugskot at smyrja trappuna við límí, og tí stóð vinstri skógvur hjá Øskufíu fastur, tá ið hon rann oman trappuna. Kongssonurin tók skógvin, sum var úr reyðargulli, lítil og vakur.

Morgunin eftir fór hann til faðir Øskufíu og segði: »Eg giftist ikki aðrari gentu enn henni, ið skógvin eigur.«

Tá gleddust systrarnar báðar, tí tær høvdu smáar føtur. Tann eldra tók skógvin og fór inn í kamarið at royna hann. Móðirin fór við henni. Men skógvurin var ov stuttur, og stóratá rúmtist ikki í honum. Móðirin rætti henni knív og segði: »Høgg tánna av. Tær nýtist ikki at ganga, tá ið tú verður drotning.«

So høgdi gentan tánna av og stappaði fótin í skógvin. Hon beit á kampi av pínu og fór yvir til kongssonin, sum lyfti hana upp á hestin og reið avstað við henni.

Tá ið tey riðu fram við grøvini, sótu tvær dúgvur í trænum og lótu:

»Enn er vón, enn er vón!
Sært tú blóð á gentuskóm?
Sera lítil skógvur er.
Heima situr brúður ber!«

Kongssonurin hugdi. Jú, blóð setti úr skónum! Hann snúði hestinum, reið aftur við svikabrúðrini og segði: »Hon er ikki sanna brúðurin. Lat hina systrina royna seg.«

So fór tann yngra inn í kamarið við skónum. Hon fekk tærnar niðurí, men hælurin var ov stórur. Mamman rætti henni knívin og segði: »Høgg av hælinum. Tá ið tú verður drotning, nýtist tær ikki at ganga.«

Gentan høgdi av hælinum og stappaði fótin í skógvin. Hon beit á kampi av pínu og fór til kongssonin, sum lyfti hana upp á hestin og reið burtur. Tá ið tey riðu fram við grøvini, sótu tvær dúgvur í nøtatrænum og lótu:

»Enn er vón, enn er vón!
Sært tú blóð á gentuskóm?
Sera lítil skógvur er.
Heima situr brúður ber!«

Kongssonurin sá blóð seyra úr skónum. Tað hevði fargað hvítu sokkarnar reyðar. Hann snúði hestinum og reið heim aftur við svikabrúðrini.

»Hon er heldur ikki sanna brúðurin,« segði hann. »Eigur tú fleiri døtur?«

»Nei,« svaraði maðurin, »bara frísutu Øskufíu frá fyrru giftuni. Hon man ikki vera brúðurin.«



Kongssonurin bað tey fara eftir henni, men móðirin sýtti: »Og nei, hon er ov skitin fyri mannaeygu.«

Men hann var avgjørdur og vildi síggja hana, og tey máttu eftir henni. Øskufía vaskaði sær um hendurnar og andlitið og fór so innar og neig fyri kongssoninum. Hann rætti henni gullskógvin. Hon setti seg á ein skammil, læt seg úr kubbutu tuflunum og fór í skógvin.

Hann sat, sum var hann skorin henni. Hon fór á føtur. Kongssonurin hugdi at henni og kendi beinanvegin vøkru gentuna aftur. Hann rópti við:

»Jú, hon er sanna brúðurin.«

Stjúkmóðirin og báðar systrarnar bliknaðu av øvund. Men kongssonurin lyfti Øskufíu upp á hestin og reið heim við henni. Tá ið tey komu fram við høtatrænum, lótu báðar tær hvítu dúgvurnar:

»Sæla vón, sæla vón!
Einki blóð á gentuskóm.
Guli skógvur til fót er skorin.
Unga brúður á kongsborg borin!«

Og dúgvurnar settust á herðarnar á Øskufíu, onnur høgrumegin og hin vinstrumegin.

Nú varð boðið í brúdleyp. Stjúksystrarnar komu og sleiskaðu fyri Øskufíu. Tær fylgdust við henni á veg í kirkju, eldra høgrumegin og yngra vinstrumegin. Men dúgvurnar høgdu annað eygað úr hvørjari.

Á veg úr kirkju býttu stjúksystrarnar um, so hin eldra gekk vinstrumegin og yngra høgrumegin. Tá høgdu dúgvurnar hitt eygað út. Og soleiðir vóru tær revsaðar fyri illnati og svikabrøgd, at báðar mistu sjónina.